

Jonna og Ib Adelbo eru í Føroyum og leggja til rættis hvítusunnuframsýning á egnum gallerí í Danmørk. Føroysk listafólk vóru í vikuni sjarmuferð í Oyndarfirði við donsku hjúnunum.

Mynd: Jens Kristian Vang

# Rinkusteinar og nýklassisisisma

*Danskir galleríeigarar eru í Føroyum og leggja til rættis hvítusunnuframsýning í Norðurjútlandi. Amariel Norðoy og Eyðun av Reyni vóru ferðaleiðarar, tá ið farið var út at skoða landið*

Høgni Mohr

Fýra listafólk vóru í Oyndarfirði týsdagin. Tað vóru teir báðir, Amariel Norðoy og Eyðun av Reyni, ið vístu donsku listafólkunum, Jonnu og Ib Adelbo, ymiskt áhugavert. Í Oyndarfirði vóru Rinkusteinar og kenda og virðismikla altartalvan hjá danska nýklassisistiska listamálaranum, Christofferi Wilhelm Eckersberg (1783-1853), sum hongur í Oyndarfjarðar Kirkju, á skránni.

**Føroysk list frammalaga**

Jonna og Ib Adelbo hava gallerí og myndaverkstað í Norðurjútlandi. Seinastu átta árini hava donsku hjúnini skipað fyri fleiri framsýningum har føroyska listin hevur verið í hásæti. Nógv ymisk listafólk hava verið umboðað á hesum framsýningum. Eisini Eyðun av Reyni, Amariel Norðoy og Zacharias Heinesen, ið donsku hjúnini vitja í hesum døgum.

Endamálið við vitjanini í Føroyum er at leggja til rættis hvítusunnuframsýningina, har teir tríggir føroysku listamenninir millum aðrar verða umboðaðir. Hjúnini hava eisini tikið myndir av føroyskum málningum. Hesar skulu vera partur av heimasíðuni hjá hjúnunum.

**List í útnorði**

Umframt at vera hugtikin av føroysku náttúrunum, og eitt sindur av Rinkusteinum, sum tey máttu kýta seg fyri at síggja í rørslu, hava tey eisini skoðað virknar føroyskar listamenn. Tórbjørn Jacobsen arbeiðir enn við stóru altartalvuni í Miðvági, og hana hildu donsku hjúnini verða stórfingna.

Ib og Jonna fáast ikki bert við føroyska list, kortini. Tey hava eisini stóran áhuga í grønlendskari og íslendskari list. Framsýningar við listaverkum úr hesum londum hava eisini verið á gallerínum í Danmørk.



Ítróttur
e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

# Kappingin harðnar

*Fótbóltur: Seinna bólkaspælið í europeisku meistarakappingini er nú farið at halla, og meðan bólkur A at kalla er avgjørdur, eru framvegis trý lið í bólki B, sum hava góðan møguleika at leika seg fram til fjórðingsfinalurnar*



Ole Gunnar Solskjær hevði bert verið á vøllinum í knappan minutt, tá hann avgjørdi dystin millum Manchester United og Bordeaux

Jákup Mørk

Í bólki A og B vórðu til samans leiktir fýra dystir týsdagin. Eftir hesar er greitt, at Barcelona í bólki A longu hevur tryggjað sær víðari luttøku í kappingini, maðn Manchester United, Fiorentina og Valencia framhaldandi berjast um rættin til luttøku í fjórðingsfinalunum.

**Bólkur A**
**Barcelona komið víðari**

Spanska stórfelagið, Barcelona, gjørdist fyrsta liðið, sum tryggjaði sær luttøku í fjórðingsfinalunum.

Hetta hendi eftir at teir týskvøldið eisini vunnu seinnu iberisku uppgerðina móti Porto.

Kósin varð sett móti endanum av fyrra hálvleiki, tá eitt hornaspark frá Figo endaði hjá Abelardo, sum langaði bóltin í meskarnar handan Vitor Baia í portugisiska málinum.

Dysturin varð í roynd og veru avgjørdur, tá eitt korter varð leikt av seinna hálvleiki. Barcelona fekk fríspark uttan fyri brotsteigin, og sum ikki einaferð var brasiliumaðurin, Rivaldo, neyvur, og sendi hann bóltin dygst inn um stongina.

Eftir hetta royndi Porto at trýsta móti Barcelona málinum, og nakrir møguleikar spurdust eisini burtur úr hesum. Barcelona hevði tó sanniliga eisini møguleikar at økja um leiðsluna, men mál komu so ikki fleiri í dystinum.

Eftir dystin var hollendski venjarin hjá Barcelona, Louis van Gaal, sera fegin um úrslitið. - Tað er flott av okkum, at vit longu hava tryggjað okkum víðari luttøku í kappingini, og tað haldi eg ikki, at nakað annað felag kann breggja sær av í løtuni, helt hollendingurin fyri, og legði hann afturat, at tað er týdningarmikið at gerast vinnari av bólkinum, við tað at hetta ávirkar, hvørji lið ein kann hitta í næsta umfarinum.

Í hinum dystinum í bólkinum, sum var millum Sparta Prag og Hertha Berlin, eydnaðist tað tjekkiska liðnum at vinna dystin 1-0. Málið kom tó ikki, fyrr enn farið varð um teir níti minuttirnar, tá Milan Fukal royndi seg við einum langskotið, sum smoygdi sær framvið stongini.

Við sigrinum varveitti Sparta Prag møguleikan fyri at tryggja sær víðari luttøku í kappingini, men kortini má tað framhaldandi metast, at Porto er tað liðið, sum hevur bestu møguleikarnir at fylgja Barcelona í fjórðingsfinalurnar.

**Bókur B**
**Einki er avgjørt**

Teir hava gjørt tað fyrr, og týskvøldið gjørdu teir tað enn einaferð. Manchester United og Ole Gunnar Solskjær megnaðu enn einaferð at venda einum hóttandi tapi til sigur, tá teir týskvøldið vóru á vitjan hjá fronsku meistarunum úr Bordeaux.

Franska liðið legði seg á odda, tá eitt, at síggja til, vandaleyst skot frá Michael Pavon, varð sent móti málinum. Flestu áskoðarararnir væntaðu helst, at Raimond Van der Gouw hevði fult tamarhald á støðuni, men onkursvegna smoygdi bólturin sær í málið.

Mistakið førdi við sær, at franska liðið veruliga fekk tak á ensku meistarunum, og eisini høvdu teir onkran møguleika at økja um leiðsluna. Alt hetta broyttist tó, tá áleyparin, Laslandes, fyrst fekk gult kort fyri at sparka bóltin, eftir at hann varð dømdur rangstaddur, og tíggju sekund seinni fekk enn eitt gult, og harvið reytt, kort frá dómaranum, eftir at hann hevði roynt seg við eini harðligari tackling móti David Beckham.

Teir á heimaliðnum vóru alt annað enn væl nøgdur við hesa avgerð, tí teir hildu at enski spice-drongurin gjørdi dekan ov nógv av í falli sínum, men dómarin var eirindaleysur.

Yvirtalsstøðan gav sjálvsagt enska liðnum stóran fyrimun, og hesum kundi liðskiparin, Roy Keane, gera sær dælt av, tá hann slapp at fara einsamallur móti franska málinum.

Í seinna hálvleiki royndu fronsku meistararnir framhaldandi at spæla seg ígjøgnum mótstøðuverjuna, og einar tvær reisur var heilt nær við, at bólturin varð sendur í netið, royndirnar endaðu ávíkavist á stongini og við síðuna av málinum.

Tá einir seks minuttir vóru eftir at leika, gjørdi Alex Ferguson av at senda Ole Gunnar Solskjær á vøllin. Norski áleyparin hevur fleiri ferðir áður prógvað, at hann er førur fyri at venda dystargongdini, og soleiðis var eisini hesu ferð.

Hann hevði einans verið á vøllinum í ein knappan minutt, tá hann fekk fatur í einum langum útspæli frá Van der Gouw, smoygdi sær fram við einum verjuleikara og langaði bóltin í netið til endaliga úrslitið.

Seinasti dysturin týskvøldið stóð millum Valencia og Fiorentina. Spanska liðið skuldi vinna dystin, um teir framhaldandi skuldi gera sær vónir um at koma víðari í kappingini, og tað eydnaðist teimum eisini at vinna 2-0.

Fyrsta málið kom, tá Adrian Ilie fekk fatur á einum innleggið, og onkursvegna fekk snarað sær á og sent bóltin í netið.

Eftir hetta hevði Valencia fleiri vandamiklar atsóknir, men italski eykamálverjin, Giuseppe Taglialatela, stóð ein branddyst, og tók sær av øllum, sum varð sent móti honum.

Fiorentina hevði tó eisini nakrar vandamiklar atsóknir, og millum annað fingu teir eitt mál kolldømt, umframt at argentinski framherji teirra, Gabriel Batistuta, rakti stongina, tá hann slapp leysur í spanska brotsteiginum.

Í staðin kundi Valencia at enda gera tað til 2-0, tá Mendieta sendi bóltin í netið frá ellivu metrum, eftir at Claudio Lopez varð feldur í brotsteiginum. Seinna málið kann vísa seg at fáa avgerandi týdning fyri lagnuna hjá Valencia í kappingini, tí hava tvey lið eins nógv stig, eru tað innanhýsis uppgerðirnar, sum gera av, hvussu støðan skal verða.

Manchester United er nú á odda í bólki B við níggju stigum, Firentina hevur sjy stig, meðan Valencia hevur seks. Niðast er Bordeaux við einum stigi.



Esther Gaard Hansen skal saman við Heidi Andreasen til Greve at royna seg í NM í svimjing

# NM í svimjing

*Um vikuskiftið skulu tvær føroyskar svimjigentur royna seg í kapping við svimjarar úr øðrum Norðanlondum*

Jákup Mørk

Um vikuskiftið verður norðurlandameistarakappingin í svimjing fyri rørslutarnað hildin í Danmark.

Kappingin fer fram í Greve, og eru tvær føroyskar svimjigentur millum luttakararnar hesu ferð.

Tær báðar eru Heidi Andreasen av Eiði og Esther Gaard Hansen úr Havn, sum eisini teljast millum luttakararnar, sum verða við, tá Paraolympisku leikirnir verða settir í Sydney í heyst.

Báðar skulu tær royna seg í somu kappingum, nevnliga 50, 100 og 400 metra frísvimjing, umframt at tær eisini skulu svimja 100 m firvald og 200 m blandað.

**Eru væl fyri**

Katrin Johansen, landsliðsvenjari, greiðir frá, at genturnar tykjast at vera rættuliga væl fyri, so spennandi verður at síggja, hvussu tær fara at standa seg millum hinar norðurlendsku svimjararnar.

Ferðalagið fer úr Føroyum fríggjamorgunin og verður aftur her á landi sunnudagin.

# ÍSF á netinum




*Ítróttasambandið hevur nú eisini fingið egna heimasíðu, har til ber at leita sær upplýsingar um ítróttina her á landi*

Jákup Mørk

Fyri stuttum lat Ítróttasamband Føroya upp heimasíðu á alnetinum. Á heimasíðuni er møguleiki hjá áhugaðum at fáa upplýsingar um leiðslu og lógir innan felagsskapin, eins møguleiki eisini er fyri at leita upp sersambondini undir ÍSF og nevndarlimir í øllum ítróttarfeløgum kring landið.

Ætlandi verður heimasíðan útbygd enn meira í framtíðini, soleiðis at eisini aðrar upplýsingar verða at síggja á skýggjanum.

Heimasíðan hevur adressuna: www.isf.fo.